

Tiltakið hjá Hjartafelagnum í farnu viku fekk sera góða undirtoku og nógv betri enn væntað.


Ikki færri enn 1514 fólk fingu mált blóðtrýstið í Dvøljuni. Tann yngsti var 3 ár og tann elsti knappliga 90.

Og leygarmorgunin vóru 377 fólk á Landssjúkrahúsinum og gávu blóðroynd til kolesterol-kanning.

Á myndini mátar Erik Nordero, yvirlækni og formaður í Hjartafelagnum, blóðtrýstið hjá einum av teimum 1514 fólkunum, sum nýttu hetta høvið at fáa staðfest, um blóðtrýstið er í lagi.

Tað er ikki gott at hava ov høgt blóðtrýst. Fólk, sum hava ov høgt blóðtrýst, vita ofta ikki av tí, tí tey kenna onki. Í USA verður ov høgt blóðtrýst kallað »tigandi dreparin«.

hd



Ein til hvønn aldursbólk

Friggjadagin komu triggjar barnabøkur frá Lærarafelagnum. Allar verða sendar limunum í Barnabókaklubbanum.

Bók nr. 33 í Barnabókaklubbanum fyri 5—8 ára gomul børn eitur »Neyðars Pettson«. Hetta er svensk litmyndabók, sum Sven Nordquist hevur skrivað og teknað. Niels J. Thomsen umsetti.

Bókin kostar 75,00 kr.

»Læna tað, segði beiggin« eitur bók nr. 34 í Barnabókaklubbanum fyri 2—4 ára gomul. Hetta er eisini svensk litmyndabók. Høvundur og teknari eru Inger og Lasse Sandberg og Niels J. Thomsen hevur týtt.


Bókin kostar 63,00 kr.


Og triðja bókin er fyri tey nakað eldri. Hon er nr. 6 í Barnabókaklubbanum hjá teimum 9—12 ára gomlu.

Bókin eitur »Vikingar rændu tey« og er eftir Torill Thorstad Hauger. Símun av Skarði týddi úr norskum.

Høvundurin hevur teknað permuna. Bókin er um írsku børnini Patrik og Sunnivu, sum vikingar rána.

Bókin er 187 síður og kostar innbundin 128,00 kr.







Faldalín merkir kvinna

Faldalín er í kvæðunum kenning fyri kvinnu. Og soleiðis eitur skaldsøga, sum Marianna Debes Dahl hevur skrivað, og sum forlagið Fannir gevur út.

Í bókini fylgja vit Mjøll, sum er smágenta í Havn í fimtiárunum, gjøgnum útisetaár heim aftur til Føroya í sjeytiárunum — ella í dag.

»Faldalín« er søgan um eina kvinnulagnu, men eisini um teir garparnar, sum spældu Lenin í studentadøgunum í Keypmannahavn — og heimafturkomnir til Føroya gjørdust lunkaðir Lions-ella Rotary-limir.

Bókin er prentað á Midtfyns Bogtryk. Olivur við Neyst hevur gjørt kápuna.

»Faldalín« er 193 síður til støddar og kostar kr. 170,—.

sjónvarp

Týsdagin 1. nov.

19.20 **Tíðindi fyri deyv**
19.30 **Eitt barnaheim í London — 2 (6)**
20.00 **Dagur og vika**
20.30
21.10 **Fat City** — am. filmur (ikki fyri sm. børn)
22.45 **Møguleikin hjá donsku coastarunum**
23.20 **Liðugt**

20.40 **Spurt og svarað:**

KFUK

Eingin fundur verður í Vargleði í dag.

útvarp

Týsdagin 1. nov.

09.30 **Stuttsøga**
11.01 **Fiskivinnutátturin** — (e)
12.55 **Føroyski skipalistin**
16.05 **Ljóðkrás**
18.00 **Barnaútvarpið**
19.00 **Á stórhvalaveiðu** — 7. sending
19.30 **Ljómið tónar friðir, fegrir** — tónleikasending til Allahalgannakvøld

Á hvíta tjaldinum



Heimskendi leikstjórin Steven Spielberg hevur gjørt hendan filmin eftir bókini hjá skotska rithøvundanum J.G. Ballard. Hann skrivaði um ræðuligu upplivingar sínar í japanskari fangalegu í øðrum heimsbardaga.

Ballard búði í Shanghai. Hann er føddur í 1930, so hann var bara drongur, tá Japan hertók Shanghai í desember 1941.

Sagt hevur verið um bókina hjá Ballard, at hon er stórsta bretska skaldsøgan um annan heimsbardaga.

Filmurin hjá Spielberg hevur eisini fingið nógv rós. Hann er gjørdur í Shanghai og fyrsti útlendski filmurin, gjørdur í Kina í nógv ár.

Høvuðsleiklutin hevur tann 13 ára gamli Christian Bale.

Seinasta sýning í Leikhús Bio í annaðkvøld kl. 20.00.



Wall Street er pengagøtan í New York, hvaðani figgjarmálini í nógvum londum verða stýrd.

Oliver Stone hevur gjørt hendan filmin um ríkmannin, kensluleysa og garvaða bústaðarhávin Gordon Gekko og Bud Fox, sum er ungur partabrævahandilsmaður.

Teir eru vinmenn, men tann eldri og royndari Gordon stýrir ti unga Bud. Bud dugir tó eisini at snúgva sær. Men har sum pengarnir ráða, vigar vinarlagið minni, tá á stendur.

Oliver Stone er vorðin kendur filmsleikstjóri hesi seinastu árini. Filmur hansara Platoon fekk ikki færri enn fýra Oscars.

Wall Street gongur í Leikhús Bio.